TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN





## Søkt verður eftir fólki til Skúlaheimið í Marknagili

Arbeiðið á Skúlaheiminum fevnir um reingerð 15 tímar um vikuna og køksarbeiðið 9 tímar um vikuna.

Tann, ið settur verður í starv, skal eisini virka sum avloysari í sambandi við reingerð í skúlanum í Smiðjugerði

Løn samb. sáttmála við HAK.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Reynhold Madsen, kokk.

Starvið skal setast sum skjótast.
Umsóknin skal sendast Skúlaheiminum í seinasta lagi 17. apríl 2008.

**Skúlaheimið í Marknagili**
Marknagilsvegur 75 · Postsmoga 3239
FO – 110 Tórshavn · Telefon 308060
Telefaks 308051

**THETA** VIÐGERÐ

THETA-FØROYAR RING 224008

## NÚ EISINI Í FØROYUM.

**Hjálp til:**
- orðblind
- at minka um strongd
- at gevast við at roykja
- at klænka
- at fáa mentalt yvirskot
- at fáa betri sjálvsálit
- próvtøkuræðslu
- o.m.a.

Ymiskar viðgerðir eru fyri børn og vaksin. Theta-viðgerðin er ein ljós-, ljóð- og verbalterapi, ið mest arbeiðir við thetabylgjum í heilanum, t.v.s. at har sum viljin ikki røkkur, hjálpir Theta-viðgerðin við at fáa gongd í og geva nýggja styrki og uppbyggja viljan.

**THETA – tað er tað**

**Suðuroyar Sjúkrahús**
FO-800 Tvøroyri
Tlf: 34 33 00 · Fax: 37 11 42
E-mail: ssh@ssh.fo

## Frítíðaravloysari til telefonvekslaran/ leiðbeiningina

Søkt verður eftir frítíðaravloysara til telefonvekslaran/ leiðbeiningina frá 21. juli til 31. august 2008.

Starvið fevnir í høvuðsheitum um telefonavgreiðslu, sjúklingaleiðbeining og postavgreiðslu.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Nærri upplýsingar viðvíkjandi arbeiðstíð v.m. fáast við at venda sær til Bergur Stórhamar, fulltrúa tlf. 34 33 00 lokal 3333.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um starvsroyndir v.m. skal sendast til:

Suðuroyar Sjúkrahús
att. umsjónarmaðurin
Sjúkrahúsbrekkan 19
800 Tvøroyri.

ella

ssh@ssh.fo

Umsóknarfreist: **28. apríl 2008.**

## Frá Tvøroyrar Klubba

Aðalfundur verður flaggdagin 25. apríl kl. 16.00

Skrá sambært lógum felagsins.

**Nevndin**

## Pedagogar

Vøggustovan á Konmansmýru søkir eftir 2 pedagogum at starvast 30 tímar um vikuna.

Størvini verða sett 15.05.2008 og 01.07.2008 (ella eftir avtalu)

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Vøggustovan er ein sjálvsognarstovnur við 35 børnum í aldrinum 1 til 3 ár. Vit hava 3 stovur og 4 starvsfólk á hvørjari stovu.

**Krøvini til tín eru:**
- At tu ert fyrikomandi og erligur.
- At tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt og ábyrgdarfult í samráð við børn og starvsfelagar.
- At tú heldur at arbeiði í einari vøggustovu er spennandi og avbjóðandi.
- At tú dugir at síggja avbjóðingar fram um avmarkingar.
- At tú ert nærverandi og dugir at lurta.
- At tú raðfestir foreldrasamstarv høgt.
- At tú vil verða við til at menna stovnin og arbeiða við tí vit seta okkum sum mál.

Vit bjóða eitt áhugavert og spennandi starv, har tú sleppur at verða við til at mynda títt dagliga arbeiði og gerandisdagin hjá børnunum. Vit liggja í einum náttúruríkum umhvørvi tætt við Hoyvíkstjørn og við øllum sniggøtunum á Konmansmýru.

Meira fæst at vita hjá leiðaranum Katrin Bjarnadóttir á tlf 215458 ella hjá álitisfólkinum Jóhanna Laksá tlf 313131

Skrivlig umsókn skal verða okkum í hendi seinast 01.05.2008.

Um ongin pedagogur søkir, verður hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv.

**Vøggustovan á Konmansmýru**
Hoyvíksvegur 41 B
FO – 100 Tórshavn

## Dagrøktari

Kvívíkar Kommuna søkir eftir dagrøktara at byrja 1. mai 2008 ella eftir nærri avtalu.

Vit leita eftir dagrøktara, ið hevur hug at arbeiða við børnum, hugflog og lætt sinnalag.

Dagrøktarin má hava tryggar og mennandi umstøður bæði innan- og uttandura.

Umsóknir skulu vera Kvívíkar Kommunu í hendi innan 25. apríl 2008.

Løn- og setanarviðurskifti eru smb. sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Áhugaði kunnu fáa meira at vita um starvið við at venda sær til leiðaran á Dagstovninum á tlf. 214360, ella til Kvívíkar Kommunu á tlf. 421498.

**Kvívíkar Kommuna**
**Víkavegur 4**
**FO-340 Kvívík**

## Handilslærlingur

Handilslærlingur til TOYSTOVUNA á Tvøroyri

Søkt verður eftir røskum fyrikomandi lærlingi.ið er kreativur og áhugaður í klædnamóta.

Ein treyt er at tú hevur FHS. HH ella líknandi prógv.

Er hetta nakað fyri teg so send eina skrivliga umsókn til okkara innan 1. mai.

**Toystovan**
Sjógøta 1 · Tvøroyri
Att: Desiree Mortensen Potts



## Til allar bindiklubbar í Føroyum

Hvat við at avsluttað ein góðan bindiklubbavetur í Bakkastovu við Ljósá ella í Luddastovu í Leynum??

**BOOKING:**
**lp@ognir.fo**
**www.ognir.fo**